## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 18. juni 2019, kl. 19$^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, John Zachariassen, Ingi Olsen, Øssur Christiansen, Símin Jákup Højsted, Laila Haldansen og Herit Magnussen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Eyðun Hansen boðað frá, at honum barst frá at møta á fundinum.
Tiltakslimurin á lista A Hilbert Elisson fekk fundarboð tann 12. juni 2019, men hann fekk ikki møtt. Símin Jákup Højsted fekk síðani fundarboð og játtaði at møta.

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Durita á Heygum boðað frá, at honum barst frá at møta á fundinum.
Tiltakslimurin á lista B Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 12. juni 2019 og játtaði at møta.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingarnar av Símin Jákup Højsted og Øssuri Christiansen sum tiltakslimir.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 151**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um Turkihúsið og Kolastykkið
J.nr. 8200002-1-2019

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 11. juni 2019 málið um Turkihúsið og Kolastykkið.
Tá ið freistin at lata tilboð inn, var farin tann 15. mai 2019 var einki tilboð innkomið. Síðani er áhugi vístur og nevndin mælir til at bjóða Kolastykkið og Turkihúsið út av nýggjum.

**Viðv. 151**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 152**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um møguliga ognartøku av matri av matr. nr. 267a hjá Hannu Kampmann.
J.nr. 8201002-1-2019

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 11. juni 2019 mál nr. 143 frá seinasta bygdarráðsfundi: tilmæli frá Teknisku nevnd um møguliga ognartøku av parti av matr. nr. 267a hjá Hannu Kampmann.
Bygdarráðið samtykti, at Tekniska Nevnd tekur upp samráðingar við Hannu Kampmann, sum skulu vera lidnar áðrenn komandi fund í teknisku nevnd. Málið verður lagt fyri aftur á bygdarráðsfundinum tann 18. juni 2019.

Nevndin mælir til, at bygdarráðssamtyktin verður broytt soleiðis, at málið verður lagt fyri fyrsta bygdarráðsfund eftir summarfrítíðina.

**Viðv. 152**
Pauli T. Petersen setti fram broytingaruppskot og mælti til at samtykkja, at tekniska nevnd ella umsitingin hjá Vestmanna Kommunu tekur upp samráðingar við Hannu Kampmann, sum skulu vera lidnar áðrenn komandi fund í teknisku nevnd. Málið verður lagt fyri aftur á bygdarráðsfundinum í august 2019.

Broytingaruppskotið hjá Paula T. Petersen var einmælt samtykt.
Atkvøtt var ikki um upprunaliga tilmælið.

**Mál 153**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um møguligt framhald av Fjalsvegi
J. nr. 501022-2-2019

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 11. juni 2019 tilmæli frá Teknisku nevnd um møguligt framhald av Fjalsvegi: fyrispurningur frá Jákup Oluf í Skálum um, hvat næsta stig er í málinum og tekningar av seyðahúsi.

Nevndin samtykti at spyrja Bygdarráðið, um ráðið er sinnað til at viðgera málið í samband við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri komandi ár.

**Viðv. 153**
Eitt einmælt bygdarráð samtykti at svara ja og lagt varð aftrat, at umsitingin fær heimild at gera eina nágreiniliga kanning av vegføringini og fíggjarviðurskiftunum.

**Mál 154**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um fyrispurning frá Hjartvard Kjærbæk um loyvi til íbúðarbygging á matr. nr. 64a.

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 11. juni 2019 fyrispurning frá Hjartvard Kjærbæk um loyvi til íbúðarbygging á matr. nr. 64a.

Nevndin mælir til at broyta byggisamtyktina soleiðis, at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr. nr. 64a, sum loyvir íbúðarbygging á miðstaðarøki, og at málið verður sent sum ískoyti til broytingina, sum júst hevur ligið frammi.

**Viðv. 154**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 155**
Tilmæli frá Havnarnevndini um gomlu bátabrúgvarnar
J.nr. 803002-1-2019

Tann 13. juni 2019 hevði Havnarnevndin fund við Jan Haldansen um gomlu bátabrúgvarnar. Jan greiddi frá, at Bátastevnunevndin ynskir at brúka gomlu bátabrúgvarnar til bátastevnurnar, heldur enn at útvega brúgvar aðra staðni frá. Ætlanin er at leggja brúgvarnar fram við pierinum uttan fyri Havnarskrivstovuna. Bátastevnan kann sjálv gera ein stóran part av arbeiðinum, eitt nú at fáa gjørt brúgvarnar klárar, at leggja tær út, fáa søkk og ketur til at halda brúgvunum o.a.. Tað, sum kommunan skal gera, er at gera festir inni á pierinum, og útvega armar frá festunum út á brúgvarnar.

Nevndin mælir til at geva Bátastevnunevndini loyvi til at halda áfram við ætlanini. Umsitingin kannar til komandi bygdarráðsfund, hvat festini á landi og armarnir út á bátabrúgvarnar kosta. Umsitingin arbeiðir somuleiðis við at orða eina avtalu/sáttmála við Bátastevnunevndina um nýtsluna av brúgvunum.

**Viðv. 155**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00

Sign.:

Pauli T. Petersen  Ingi Olsen  Símin Jákup Højsted  John Zachariassen

Laila Haldansen  Herit Magnussen  Durita á Heygum